## Federer sligin úr í fyrstu rundu



Roger Federer er mest sum einaráðandi í tennisheiminum hjá monnum, men í nátt bleiv hann sligin út í fyrstu rundu í sterku tenniskappingini, Indian Wells, sum hann hevur vunnið seinastu trý árini. Her møtti hann argentinanum, Guillermo Canas, og hesin vann dystin 2-0 við settúrslitunum 7-5, 6-2. Sostatt steðgaði Canas langu sigursrøðini hjá Federer, sum hevði vunnið seinastu 41 dystirnar undan dystinum ímóti Canas. Hetta er harafturat fyrstu ferð í á leið tvey ár, at Federer verður sligin út í fyrstu rundu í nakrari kapping.

## Barcelona vil hava Robben

Í eina tíð hevur ljóðað, at Barcelona ætlar at keypa portugisiska landsliðsleikaran í Manchester United, Cristiano Ronaldo. Nú ljóðar tó, at um Barcelona ikki fær Ronaldo, so ætla teir sær at venda eyguni til eitt annað enskt stórfelag. Arjen Robben er rættiliga ónøgdur við síni støðu í Chelsea, har hann bert er byrjaður inni í 15 dystum í Premier League hetta kappingarárið. Sum skilst vil hann sleppa frá Chelsea, og Barcelona sigst vera klárt at bjóða á leið 180 milliónir kr. fyri hollendska landsliðsleikaran, um Chelsea vil selja hann.

# rotsspørk



*Nýggi EB/Streymarin, Hanus Eliasen, spældi væl í hálvfinaluni leygardagin, men hann var ikki við í finaluni sunnudagin. Her sæst í múrinum saman við polska Rafael Kwiecinski*

Sostatt vann B36 bronsuna í Klaksvíkskappingini.

### HB fór avstað við steypinum

Seinni dysturin sunnudagin var finalan ímillum HB og EB/Streym. EB/Streymur hevði kanska okkurt at prógva, eftir at teir taptu meistaraheitið ímóti HB seinasta kappingarár.

Tað vóru eisini sundalagsmenn, sum vóru heldur betri í fyrra hálvleiki. Ikki tí, spælið var ikki serliga gott, og tað mesta gekk fyri seg á miðjum vølli, har nærdystirnir vóru nógvir í tali. Liðini funnu ongantíð tað góða fótbóltsspælið fram í fyrra hálvleiki, men tættast við eitt mál var EB/Streymur, tá teir fingu fríspark um miðjan hálvleikin. Bárður Olsen sendi hetta inn í brotsteigin, og her fekk Sorin Anghel eina langa tá á bóltin, sum fór beint fram við málinum.

Dysturin var ikki meir enn komin í gongd eftir steðgin, so hevði dómarin dømt brotsspark til EB/Streym. Eitt innkast bleiv kastað inn í brotsteigin, og her metti dómarin, at Hans á Lag helt í Sorin Anghel. Brotssparkið sendi Ronnie Samuelsen trygt í netið, og so var EB/Streymur á odda 1-0.

Liðini gjørdu annars fleiri útskiftingar eftir steðgin, og nú var tað HB, sum setti seg á dystin. Teir fingu onkran møguleika eftir málið hjá EB/Streymi, men teir vóru ongantí heilt tætt við at fáa útjavnandi málið.

Tá eitt korter var eftir bragdaði tó hjá HB. Eitt innkast bleiv sent inn í brotsteigini, og ein misskiljing í EB/Streyma-verjuni førdi við sær, at bólturin endaði hjá einum púra leysum Tór-Ingar Akselsen, sum sendi bóltin í netið til javnleik 1-1.

1-1 gjørdist eisini endaliga úrslitið, og so skuldi longd leiktíð til fyri at finna ein vinnara. Her var HB eisini betra liðið í umdystinum, men hóast hetta, so tóktust bæði liðini mest sum bara bíða eftir brotssparkkappingini. Har kom heldur einki mál afturat í umdystinum, og tí skuldu liðini út í brotssparkskapping.

Her skoraðu bæði liðini fyrstu fýra brotsspørkini, men í fimta sparkinum fall avgerðin. Her brendi ein EB/Streyma-leikari, meðan HB skoraði sítt brotsspark, og sostatt gjørdist HB vinnari av Klaksvíkskappingini 2007.

# EB/Streymur og HB sigraðu í hálvfinalunum

**Tvey tey ovastu liðini frá farna kappingarári, EB/Streymur og HB, blivu klár til finaluna í Klaksvíkskappingini leygardagin, tá tey vunnu á ávikavist B36 og KÍ**

FÓTBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Leygardagin tjóvstartaði kappingin hjá monnum í fótbólti, tá árliga Klaksvíkskappingin var á skránni. Hetta er ein kapping millum trý tey ovastu liðini frá farna kappingarári umframt KÍ, so luttakandi liðini í ár vóru HB, EB/Streymur, B36 og KÍ.

Fyri nøkrum vikum síðani var lutakast til kappingina, og her gjørdist greitt, at EB/Streymur og B36 brustu saman í fyrru hálvfinaluni, meðan KÍ tók ímóti føroyameistarunum, HB, í seinna hálvfinaludystinum.

### Málmansdropp kostaði

Dysturin millum EB/Streym og B36 byrjaði kl. 12.45, og hvíta havnarliðið fekk eina heldur betri byrjan uppá dystin. Teir høvdu okkurt gott álop tíðliga í dystinum, men so við og við tók EB/Streymur yvir. Teir spældu góðan fótbólt, og til tíðir vístu teir heilt gott spæl, tá teir spældu seg fram eftir vøllinum. Sundalagmenn komu eisini fram til onkrar smærri møguleikar í fyrra hálvleiki, og í onkrum føri vóru teir tætt við at leggja seg á odda.

Stutt undan steðginum bragdaði tó hjá EB/Streymi. Ein bóltur bleiv sendur inn til Ronnie Samuelsen, sum var staddur á miðjum vølli. Hann skuldi senda ein langan bólt inn um B36-verjuna til Arnbjørn Hansen, men bólturin bleiv alt ov langur, og sá út til at enda inni hjá Jákupi Mikkelsen í málinum. Jákup fór tó fullkomiliga skeivur av bóltinum, sum sprakk upp um hann og inn í tóma B36-málið, og so var støðan 1-0 til B36.

Í seinna hálvleiki misti felagsliðið úr Sundalagnum tað mesta av sýnum flogið, og í staðin var tað B36, sum nú setti seg á dystin. Teir royndu av øllum alvi at leggja trýst á EB/Streym, og í onkrum føri vóru teir eisini tætt við at fáa útjavnandi málið. Trýstið hjá B36 gav tó ikki úrslit í hesum dystinum, og endaliga úrslitið gjørdist 1-0 til EB/Streym. Sostatt bleiv felagsliðið klárt til sína fyrstu finalu í Klaksvíkskappingini nakrantíð.

### HB vann á vertunum

Í seinna dystinum møttust KÍ og HB. Her gekk javnt á fyrstu løtuna, og bæði liðini høvdu onkrar smærri møguleikar at leggja seg á odda. Tað vóru føroyameistararnir úr HB, sum tóku leiðsluna stutt undan steðginum við einum góðum máli.

Rókur av Fløtum Jespersen kom at standa væl fyri inni í brotsteiginum hjá KÍ. Hann gjørdi ikki mætari enn at smekka til, og bólturin streyk inn við nærmaru stólparót, og so var HB á odda 1-0.

Seinni hálvleikur var tó ikki serliga gamal, so javnaði KÍ. Eitt hornaspark bleiv sent høgt inn fyri málið, og uttarlaga í brotsteiginum tamdi Kaj Ennigarð bóltin, áðrenn hann skeyt ímóti málinum. Bólutinr streyk upp í málhornið, og so var 1-1.

HB gav tó ikki skarvin yvir, og seint í dystinum fingu teir avgerandi málið. Eitt fríspark bleiv sent inn í brotsteigin, og har fekk KÍ ikki rudda bóltin vekk. Hann endaði hjá Kári Nielsen, sum skeyt ímóti málinum. Bólturin tók í ein KÍ-verjuleikara á vegnum og snýtti Meinhard í málinum, og so var HB aftur á odda 2-1. Hetta gjørdist eisini endaliga úrslitið, og sostatt skuldi HB møta EB/Streymi í finaluni.



*EB/Streymur vann sína hálvfinalu ímóti B36 leygardagin við máli frá Ronnie Samuelsen. HB vann eisini sína hálvfinalu ímóti KÍ, og sostatt skuldu HB og EB/Streymur møtast í finaluni.*